# Stórt føðingardaghald í Tórshavnar Kommunuskúla

**Seinasta vikuskiftið var nógvur aktivitetur í Tórshavnar Kommunuskúla í Tórsgøtu í sambandi við at 50 ár eru liðin síðan skúlin varð tikin í nýtslu, og 90 ár eru síðan Realskúlin varð bygdur**

LAGT TIL RÆTTIS:
*Rigmor Dam og Magnus Gunnarsson.*

Áhugin var sera stórur fyri framsýningini um Kommunuskúlan, sum Jórunn Dánialsdóttir Poulsen saman við øðrum hevur staðið fyri. Nógv av teimim vitjandi kendu seg sjálvi, foreldur ella ommur og abbar aftur á myndunum.

Fríggjakvøldið var ein konsert fyri almenninginum. Tað var kór og orkestur skúlans, umleið 90 luttakandi, næmingar og lærarar, sum framførdu. Høvuðsverkið á konsertini var Kommunuskúlakantatan "Fedranna tala", sum Heðin Brú og Hans Jacob Højgaard gjørdu til Kommunuskúlavígsluna 2. sep. 1956.

Leygarkvøldið var sama konsert framførd fyri innbodnum. Konsertirnar fríggjakvøldið og leygarkvøldið vóru við barnakóri, lærarakóri og skúlaorkestrinum.

Leygarkvøldið varð eisini eitt minnisrit lagt fram, sum Jens Marius Hentze, fyrrverandi lærari á skúlanum, skrivaði í samband við føðingardagin.



*Nógv fólk vitjaði Kommunuskúlan seinasta vikuskiftið.*



*Jens Marius Hentze, fyrrverandi lærari á skúlanum, skrivaði minnisritið um skúlan, og varð tað lagt fram leygarkvøldið.*



*Áhugin var sera stórur fyri framsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir Poulsen stóð fyri. Her saman við Jákup Thomsen, lærara.*



*Nógv av teimum vitjandi kendu seg sjálvi, foreldur ella ommur og abbar aftur á myndunum.*



*Tað var kór og orkestur skúlans, umleið 90 luttakandi, næmingar og lærarar, sum framførdu "Fedranna talu", sum Heðin Brú og Hans Jacob Højgaard gjørdu til Kommunuskúlavígsluna 2. sep. 1956.*



*Fríggjakvøldið var ein konsert fyri almenninginum, og leygarkvøldið fyri innbodnum lærarum, starvsfólkum og býráðnum.*